## Úrslit frá 2. umfari í Daewoo Marathon Cup

**Menn 5 km**

| Pláss | Tíð | Navn | Árg. | Felag/Staður |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 17,10 | Símun Joensen | 1983 | Klaksvík |
| 2 | 17,54 | Snorri Patursson | 1979 | Tórshavn |
| 3 | 18,06 | Jonhard Larsen | 1966 | Treysti |
| 4 | 18,17 | Samson Nesá | 1972 | Gøta |
| 5 | 18,20 | Sigurð Justinussen | 1967 | Bragdið |
| 6 | 18,28 | Hjalti Gunnarstein | 1961 | Bragdið |
| 7 | 19,22 | Birgir Sondum | 1961 | Bragdið |
| 8 | 19,41 | Jósvein Herup Olsen | 1958 | Bragdið |
| 9 | 19,49 | Trygvi Hansen | 1966 | Bragdið |
| 10 | 19,55 | Suni Jacobsen | 1967 | Bragdið |
| 11 | 20,10 | Óli Olsen | 1949 | Bragdið |
| 12 | 20,12 | Steintór Hjaltalin | 1949 | Bragdið |
| 13 | 21,09 | Jákup Alberg Berg | 1963 | Tórshavn |
| 14 | 21,13 | Robert Vilhelmsen | 1951 | Bragdið |
| 15 | 21,17 | Ólavur Herup Olsen | 1943 | Bragdið |
| 16 | 22,53 | Petur Dorian Petersen | 1968 | Tórshavn |

**Kvinnur 5 km**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 19,44 | Rigmor N. Arge | 1969 | Bragdið |
| 2 | 25,24 | Ingrid Patursson | 1958 | Miðvágur |
| 3 | 25,52 | Brindis R. Weihe | 1968 | Bragdið |
| 4 | 26,22 | Annika Sivertsen | 1969 | Klaksvík |

**Gentur -7 (700 m)**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 3,06 | Lydia U. Marsten | 1995 | Klaksvík |
| 2 | 3,54 | Marianna G. Eystberg | 1998 | Klaksvík |
| 3 | 4,22 | Gunn Joensen | 1996 | Klaksvík |
| 4 | 4,40 | Lisa Joensen | 1997 | Klaksvík |
| 5 | 6,24 | Valborg Vang | 1996 | Klaksvík |
| 6 | 7,19 | Ingibjørg Petersen | 1995 | Tórshavn |

**Dreingir -7 (700 m)**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 2,46 | John Viljam Johannesen | 1995 | Treysti |
| 2 | 2,58 | Regin Joensen | 1995 | Tórshavn |
| 3 | 3,03 | Páll R. Weihe | 1995 | Bragdið |
| 4 | 3,11 | Tórur Justesen | 1995 | Klaksvík |
| 5 | 3,27 | Ólavur Joensen | 1996 | Tórshavn |
| 6 | 3,41 | Beinir Johannesen | 1997 | Treysti |
| 7 | 3,45 | Steingrímur Hallsson | 1997 | Bragdið |
| 8 | 4,03 | Osvald á Marknagili | 1996 | Klaksvík |
| 9 | 4,29 | Josvein Joensen | 1996 | Klaksvík |

**Gentur -10 (700 m)**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 2,36 | Bjørg Seloy | 1992 | Argir |
| 2 | 2,44 | Vilbjørg Johannesen | 1992 | Treysti |
| 3 | 2,49 | Louisa Østerø | 1993 | Treysti |
| 4 | 2,51 | Jórun Klakkstein | 1993 | Klaksvík |
| 5 | 2,52 | Gu_ri_ G. Eystberg | 1994 | Klaksvík |
| 6 | 3,07 | Erla Jacobsen | 1993 | Haraldsund |
| 7 | 3,11 | Una Joensen | 1993 | Klaksvík |
| 8 | 3,16 | Bergfrí_ Joensen | 1994 | Klaksvík |
| 9 | 3,21 | Gunnri_ Frí_a Joensen | 1994 | Klaksvík |
| 10 | 3,29 | Elsebeth Danielsen | 1993 | Klaksvík |
| 11 | 4,04 | Rebekka Egholm | 1994 | Klaksvík |

**Dreingir -10 (700 m)**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 2,15 | Ari Johannesen | 1992 | Argir |
| 2 | 2,28 | Sigmund Olsen | 1992 | Hvannasund |
| 3 | 2,40 | Rúni Seloy | 1994 | Tórshavn |
| 4 | 3,10 | Beinir Poulsen | 1994 | Klaksvík |
| 5 | 3,18 | Ásbjørn Vang | 1994 | Klaksvík |
| 6 | 3,38 | Tórur N. Guðjonsson | 1993 | Klaksvík |
| 7 | 4,06 | Hans Petur Sólheyg | 1994 | Klaksvík |

**Gentur -13 (870 m)**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 3,38 | Christa R. Weihe | 1991 | Bragdið |
| 2 | 4,04 | Anja Johannesen | 1991 | Argir |
| 3 | 4,08 | Eyð Joensen | 1991 | Tórshavn |
| 4 | 5,04 | Borghild Reyðberg | 1991 | Klaksvík |

**Dreingir -13 (870 m)**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 2,52 | Álvur F. Christiansen | 1989 | Treysti |
| 2 | 2,55 | Rógvi S. Holm | 1990 | Argir |
| 3 | 2,56 | Bárður Johannesen | 1989 | Argir |
| 4 | 3,07 | Jan Elmar Sørensen | 1991 | Treysti |
| 5 | 3,36 | David Thomsen | 1989 | Hvannasund |

**Dreingir -17 (870 m)**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 2,38 | Jóan Karl Joensen | 1987 | Kollafjørður |
| 2 | 2,45 | Martin Rói Vilhelmsen | 1986 | Tórshavn |
| 3 | 2,54 | Christian Olsen | 1985 | Klaksvík |

# Nýggjur vinnari

**Annað umfarið í Daewoo Marathon Cup kappingini varð runnið um vikuskiftið, og fyri fyrstu ferð stóð Símun Joensen ovastur á sigurspallinum hjá monnunum**

RENNING
*Tíðindaskriv*




*Símun Joensen gjørdi hesaferð bart, men í samlaðu støðuni er Jonhard Larsen framvegis á odda*

Leygardagin 14. september varð skipað fyri rennikapping í Klaksvík. Kappingin var annað umfar av Daewoo Marathon Cup 2002, sum sersambandið fyri frælsan ítrótt, FÍF, í samstarvi við P/F Esmar Simonsen skipar fyri.

Tilsaman luttóku 66 vaksin og børn úr øllum Føroyum. Líkindini at renna leygardagin vóru av teimum allarbestu, tí tað var eitt lítið lot og passaliga lýtt. Tey vaksnu runnu 5 km, meðan børn -7 og -10 runnu 700m og børn -13 og -17 runnu 870m.

### Símun Joensen vann

Hjá teimum 16 monnunum gjørdist Símun Joensen úr Klaksvík vinnari við tíðini 17,10 min. Hetta er ein góð tíð hjá Símuni, tí rutan er hørð við tað, at rennast skal fýra ferð frá Stoksoyravegi og niðan á Bumshamarveg. Símun, sum gjørdist nummar tvey í Ólavsøkurenningini hevur víst, at hann umframt góð fótbóltsevnir, eisini hevur góð rennievnir. Tað hevði verið spennandi at sæð, hvussu langt hann kundi nátt, um hann veruliga satsaði uppá renning. Nummar tvey gjørdist Snorri Patursson úr Havn við tíðini 17,56 min., meðan vinnarin av fyrsta umfari í Havn, Jonhard Larsen úr Treystinum gjørdist nummar trý, við tíðini 18,06 min. Hetta er eisini gott av Jonhardi, sum í løtuni er í tungari marathon-venjing, tí hann skal nevniliga luttaka í Berlin Marathon seinast í mánaðinum. Í samlaðu kappingini liggur Jonhard á odda. Hann er góðar 2 minuttir frammanfyri Sigurð Justinussen úr Bragdinum og Snorra Patursson úr Havn.

Hjá kvinnunum gjørdist, sum ikki einaferð, Rigmor N. Arge úr Bragdinum tryggur vinnari við tíðini 19,44 min. Nummar tvey gjørdist Ingrid Patursson úr Havn, meðan Brindis Weihe úr Bragdinum gjørdist nummar trý. Nummar fýra gjørdist Annika Sivertsen úr Klaksvík. Í samlaðu kappingini liggur Rigmor trygt á odda.

Hjá veteranum, sum eru føddir í 1956 ella fyrr, gjørdist Óli Olsen úr Bragdinum vinnari við tíðini 20,10 min. Beint í hølinum á Óla kom Steintór Hjaltalin úr Bragdinum við tíðini 20,12 min. Nummar trý gjørdist hesaferð Robert Vilhelmsen úr Bragdinum. Í samlaðu kappingini liggur Óli á odda við 45 sek. frammanfyri Steintór.

### Børn -7

Av teimum seks gentunum gjørdist Lydia U. Marsten tryggur vinnari, frammanfyri Marionnu G. Eystberg og Gunn Joensen. Tær eru allar úr Klaksvík. Í samlaðu kappingini er tað bert Ingibjørg Petersen úr Havn, sum hevur møguleika at gjøgnumføra øll fýra umførini.

Hjá teimum níggju dreingjunum gjørdist John Viljam Johannesen úr Treystinum enn einaferð vinnari. Nummar tvey gjørdist Regin Joensen úr Havn, meðan Páll R. Weihe úr Bragdinum gjørdist nummar trý. Í samlaðu kappingini liggur John Viljam á odda við 23 sek. frammanfyri Regin og 39 sek. frammanfyri Páll.

### Børn -10

Her vóru tað 11 gentur í kappaðust, og gjørdist Bjørg Seloy úr Havn vinnari frammanfyri Vilbjørg Johannesen og Louisu Østerø báðar úr Treystinum. Í samlaðu kappingini er Bjørg eisini á odda við 21 sek., meðan Vilbjørg á øðrum plássi bert er 2 sek. frammanfyri Louisu.

Av teimum sjey dreingjunum gjørdist Ari Johannesen av Argjum vinnari frammanfyri Sigmund Olsen úr Hvannasundi og Rúna Seloy úr Havn. Í samlaðu kappingini er Ari 23 sek. frammanfyri Sigmund, og eru bert teir báðir eftir í kappingini.

### Børn -13

Álvur F. Christiansen úr Treystinum gjørdist vinnari av teimum fimm dreingjunum, frammanfyri Rógva S. Holm og Bárður Johannesen báðir av Argjum. Í samlaðu kappingini liggur Bárður á odda við 1 sek. frammanfyri Rógva, sum aftur er 17 sek. frammanfyri Jan Elmar Sørensen úr Treystinum.

Hjá teimum fýra gentunum var tað enn einaferð Christa R. Weihe úr Bragdinum, sum vann. Hesaferð var tað frammanfyri Anju Johannesen av Argjum og Eyð Joensen úr Havn. Nummar fýra gjørdist Borghild Reyðberg úr Klaksvík. Í samlaðu kappingini er tað bert Christa, sum hevur møguleika at vinna samlað.

### Børn -17

Í hesum bólkinum eru tað tíverri bert dreingir, sum hava luttikið í tveimum teimum fyrstu umførunum. Av teimum trimum dreingjunum gjørdist Jóan Karl Joensen úr Kollafirði vinnari frammanfyri Martin Róa Vilhelmsen úr Bragdinum og Christian Olsen úr Klaksvík. Í samlaðu kappingini liggur Jóan Karl á odda frammanfyri Martin Róa.

Triðja umfar av Daewoo Marathon Cup verður á Toftum um tríggjar vikur, tvs. leygardagin 12. oktober. Tá renna tey vaksnu Runt Agnið, sum er ein teinur uppá 10,5 km. Tey yngru børnini renna 600m meðan tey eldru børnini renna 1,6 km.



# Bill hevur úttikið sítt lið

**Fýra spælarar úr Frem í Keypmannahavn eru á U–17 liðnum, sum síðst í mánaðinum fer til Rumenia at luttaka í EM undankappingarbólki**

U-17 LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*



*Bill Jacobsen, venjari hjá U-17 landsliðnum, hevur úttikið fýra spælarar úr danska høvuðsstaðarfelagnum Frem til EM undankappingina, sum Føroyar skulu luttaka í um mánaðarskiftið*
*savnsmynd*

Bill Jacobsen, venjari hjá U-17 landsliðnum, hevur úttikið fýra spælarar úr danska høvuðsstaðarfelagnum Frem til EM undankappingina, sum Føroyar skulu luttaka í um mánaðarskiftið.

Talan er kortini um føroyskar spælarar, sum áður hava umboðað B36 og HB. Teir fýra ganga á Hasselgods skúlanum, sum Brøndby IF eigur, og teir spæla á unglingaliðnum hjá Frem. Felagið í Valby er eitt av grannafeløgunum hjá Brøndby. Hesir fýra spælararnir eru málverjin Gunnar Nielsen, miðvallararnir Jónas Þór Næs, Emil Nolsøe Leifsson, sum er liðformaður á U–17 landsliðnum, og Bogi Hermansen, sum er álopsspælari.

Sammett við liðið, sum fyrst í august var í Luleå í Svøríki og luttók í NM kappingini, eru tríggjar útskiftingar gjørdar, m. a. tí onkur spælari hevur givið avboð.

Teir, sum fara av annan leygardag eru málverjarnir Gunnar Nielsen, Frem, og Heini Kristiansen, sum er av Skála. Tað var hann, sum vardi málið hjá 1. deildarliðnum síðsta sunnudag. Verjuspælararnir eru Poul N. Poulsen, VB, Jústinus H. Hansen, NSÍ, Fritleif í Lambanum, ÍF, Svenn Dam Jacobsen, HB, Símun Louis Jacobsen, GÍ, Borgar Kristiansen, Skála og Allan Tungá OB í Odense. Hann hevur spælt við KÍ, men familjan er fyri stuttum flutt niður at búgva. Miðvallararnir eru Jóhan E. Mouritsen, HB, Jónas Þór Næs, Frem, Mikkjal T. Hentze, B71, Ovi Magnussen, B68, Emil N. Leifsson, Frem og Páll M. Joensen, HB. Álopsspælararnir eru Bogi Hermansen, Frem, Steffan Kalsø, KÍ og Hartman Hansen, VB.

Føroyska liðið skal spæla tríggjar dystir. Tann fyrsti verður ímóti rumensku vertunum 30. september, so verður spælt ímóti Eysturríki 2. oktober, og síðsti dysturin verður Makedonia fríggjadagin 4. oktober. Ferðalagið verður aftur í Vágum seinnapartin leygardagin 5. oktober, sum er tann dagurin, tá síðsta umfarið í 1. deild verður spælt.

Umframt spælararnar verða í ferðalagnum Bill Jacobsen, venjari, Pætur Clementsen, hjálparvenjari, Heri Olsen, liðleiðari og Fanny Kruse, fysioterapeutur. Ferðaleiðari verður Børge B. Hansen.

### Spæla nógv

Bill Jacobsen, venjarin, sigur seg ikki enn vita so nógv um mótstøðuliðini, men hetta fara teir at kanna hesa næstu vikuna. Hann ivast kortini ikki í, at mótstøðan verður ríkiliga stór, og hann roknar við, at bæði Rumenia og Eysturríki hava heilt góð lið. Tá Føroyar í august luttóku í NM kappingini í Svøríki var talan um 4–0 tap ímóti Onglandi og Noregi. Svøríki vann 3–1 á Føroyum, og síðsti dysturin endaði við 1–1 ímóti Danmark, sum kortini vann brotssparkskappingina og harvið endaðu Føroyar aftast í kappingini.

Frá leygarmorgninum og inntil sunnumorgunin verður síðsta venjingarlegan á Svangaskarði. Venjarin ásannar, at tað er torført at fáa kabalina at ganga upp. Dreingirnir, sum eru føddir í 1986 og í 1987, eru nógv upptiknir av dystum í dreingjadeildini og unglingadeildini, og onkrir spæla eisini í vaksnamannadeildunum.

*Eru teir væl fyri?*

– Stóri spurningurin er altíð, um føroysku spælararnir standa seg likamliga. Tað hevði verið ynskiligt, um føroysku spælararnir vandu meiri, og so er tað aldurin. Á liðunum, sum vit spæla ímóti, eru nógv teir flestu altíð úr eldra árganginum. Hjá okkum er úttøkugrundarlagið ikki so stórt, men hesa ferð eru tað bara tveir, sum eru frá 1987. Hinir eru allir føddir í 1986, sigur Bill Jacobsen.

Sambært kappingarskipanini skuldi síðsta umfarið í dreingjadeildini verið spælt annan leygardag. Men tá fer U–17 landsliðið av landinum. Tí er umfarið flutt fram til nú mikudagin.

# Gull og skreyt í Klaksvík

**Meistararnir úr KÍ og tær á mótstøðuliðnum hesa ferð, B68, fáa heiðursmerki í Klaksvík, meðan tað verður roknað við, at B36 skal hava silvurkrónurnar í Gundadali**

1. DEILD KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Í morgin verður síðsta umfarið í kvinnukappingini spælt. Tað er longu langt síðani greitt, at steypavinnararnir úr KÍ eisini eru meistarar. KÍ kvinnurnar fyrireika seg til Europa Cup umfarið, sum tær skulu til Svøríkis at spæla í. Mikudagin vóru tær frá morgunstundini av og inntil seint á kvøldi á Svangaskarði, har tær vandu seg at spæla á grasi. Eitt nú spældu tær mikukvøldið tríggjar ferðir 25 minuttir ímóti U–19 kvinnulandsliðnum, sum fyrireikar seg til EM undankapping.

Men í morgin fara KÍ kvinnurnar eina løtu at venda tankunum frá Europa Cup og til heimligu kappingina. Tá skulu tær spæla á heimavølli ímóti B68, og aftaná fara umboð fyri FSF at handa KÍ gullkrónur og FM steypið, sum tær eisini vunnu í fjør og í fyrraárið. Harvið fáa tær steypið til ognar, sum Vogue gav í 1995.

Harvið kunnu KÍ kvinnurnar lata seg fagna av trúgvu viðhaldsfólkunum, sum sammett við aðra staðni møta væl upp til dystirnar, og nú fáa møguleikan at takka góða liðnum fyri ídni, nærlagni og gott fótbóltsspæl og ein einastandandi hugburð, tá tað ræður um at fáa fíggjarligt grundarlag til vega undir altjóða luttøkuni.

Tað er greitt, at mótstøðuliðið hjá KÍ í morgin, B68, fer at fáa heiðursmerkir. Í FSF rokna teir við, at talan verður um bronsumerkini. B68 hevur ein lítlan møguleika at røkka silvurkrónunum, og tær ætla at gera sítt til at fáa fínaru merkini. Kravið er, at tær vinna á KÍ, og at HB megnar at vinna á B36, sum liggur til at vinna silvurmerkini.

– Tað er kanska ikki nógv, sum bendir á, at HB fer at vinna á B36. Men vit ætla at gera okkara. Vit hava staðið okkum væl í undanfarnu dystunum ímóti KÍ, og vit vóna, at áskoðararnir, sum fara at møta upp at heiðra KÍ fyri væl uppiborna FM heitið, verða vitni til ein góðan dyst, sigur Herman Jacobsen, sum er venjari hjá B68 kvinnunum.

Tá hann sigur, at B68 hevur staðið seg væl í síðstu dystunum ímóti KÍ, so sipar hann til teir báðar síðstu dystirnar á Toftum. B68 vann annan 2–1, og KÍ vann hin 2–1. Fyrr í summar tapti B68 7–1 í Klaksvík, men úrslitini hava víst, at talan hevur verið um stóra framgongd hjá B68 síðani tá. Kortini undirstrika tey á Toftum, at sjálvandi er KÍ favorittur í morgin.

Síðsti dysturin verður millum Skála og GÍ.